# Langtíðarkanning av menningini av lesi- og skriviførleika hjá føroyskum børnum

*Karolina Matras & Katrin Næs*

*Fyrsta stigið í eini betraðari lesiundirvísing er uppstigan av undirvísingini á Føroya Lærararaskúla, sum í hesari verkætlan fær ein virknan lut í at framleiða vitan, sum tekur støði í føroyska veruleikanum.*

*Mentamálamálaráðið hevur harumframt tørv á, at avgerðir og skipanir av skúlans dagligdegi verða tiknar á einum haldgóðum empiriskum grundarlagi.*

*Hendan verkætlan er eitt slóðbroytandi arbeiði á tí námsfrøðiliga granskingarøkinum, og arbeiðið viðvíkjandi yvirlitskanningarpartinum er partvíst farið í gongd. Fyrsta yvirlitskanningin fór fram í august 2007, og yvirlitskanningar verða aftur gjørdar í 2008 og í 2009.*

*Tað er av stórum týdningi at byggja brýr ímillum lesigranskingina og praktiska arbeiðið sum lærari. Vantandi sambindingin ímillum gransking í lesing og veruleikan í fólkaskúlanum er ein stórur trupulleiki. Her verður bæði hugsað um ta námsfrøðiligu granskingina og grundgranskingina í lesing, t.v.s. gransking í, hvat tað er, sum hendir, tá ið ein lesur, og tá ið ein hevur trupulleikar við at lesa. Afturat lesitrupulleikunum er eisini týdningarmikið at hyggja at, hvussu vit ogna okkum málið, og hvønn týdning málmenningin hevur sum fyritreyt fyri lesingina.*

*Tað hevur stóran týdning at upplýsa námsfrøðingum um stóra týdningin av at duga at fylgja málsligu menningini hjá børnunum á teimum stovnum, sum tey koma at arbeiða á. Eisini skulu námsfrøðingarnir gerast førir fyri at arbeiða við málbólkum við børnum við veikum málsligum fyritreytum.*

*Tað kann eingin ivi vera um, at tað er alneyðugt at hava serlig atlit fyri lesing og granskingini henni viðvíkjandi, um vit skulu gera okkum nakrar hugsanir um støðugan vøkstur í samfelagnum. Tað, ið globaliseringin í dag krevur av menniskjum, er virkisfør fólk, sum eru før fyri at gera eina útbúgving lidna. Lesing er eitt mentanarkynstur. Samfelagið hevur als ikki ráð at lata ein stóran part av næmingunum fara úr skúlanum sum "funktionellir analfabetar".*

*Ein partur av grundarlagnum undir verkætlanini er at savna inn nýggjar vísindaligar sannroyndir at brúka til gransking og undirvísing á Føroya Lærararaskúla. Hesar sannroyndir skulu annars viðgerast og í navnloyndum sniði goymast á ein slíkan hátt, at onnur kunna fáa*

*gleði af teimum – bæðu granskarar og lesandi – t.d læraralesandi og lesandi við Føroyamálsdeildina bæði á bachelor og master støði.*

## Inngangur

Semja er um, at føroyska samfelagið hevur tørv á einum breiðari fíggjarligum støði at byggja á. Hetta kemur til sjóndar í ymiskum skjølum – t.d. Visión 2015 og Frágreiðing løgmans á Ólavsøku 2007 – og av Løgtingsins aðalorðaskifti um fólkaskúlan, har víst varð á, at millum annað undirvísingin í lesing skal styrkjast.

Henda granskingarverkætlan hevur sum endamál at útvega støði undir framtíðar avgerðum í skúlaverkinum, bæði hvat viðvíkur karmunum innan skipanina eins væl og innihaldinum í undirvísingini.

Visión 2015 hevur sum eitt av sínum partsmálum, at 90 % av øllum føroyingum skulu hava eina miðnámsútbúgving. Í PISA-verkætlanini er sett eitt niðara mark fyri, nær ein er førur fyri at fullføra eina miðnámsútbúgving. Ein kanning, sum NSR-tænastan í Eysturoy hevur gjørt, vísir, at førleikin hjá skúlabørnum í lesing ikki er nøktandi eftir loknan 1. flokk.

## Hvat er lesing?

Vit lesa fyri at kunna okkum um okkurt, vit lesa fyri at læra og fyri at taka okkum av løttum. Vit lesa, tí at onkur hevur sagt, at vit eiga at lesa, tí at onkur hevur sagt, at okkum fer at dáma at lesa, ella vit lesa, tí vit vilja lesa, og tí vit mugu lesa.

Við hvørt lesa vit fyri at finna fram upplýsingar, og við hvørt lesa vit fyri at fara í dýpdina í tekstinum og grunda um innihaldið í tekstinum, ella hvussu teksturin er bygdur upp. Við hvørt gevur lesingin okkum upplivingar, sum røkka langt út um tekstin, málið og myndirnar. Øll lesing ger okkum til betri lesarar, og *vit skulu við góðari samvitsku brúka tíð at lesa.*

Lesarar – í skúlanum næmingar - hava ymiskt mentanarligt og sosialt grundarlag, ymsar lesiroyndir, ymsar lesiførleikar og lesiupplivingar.

Við øðrum orðum fevnir lesiupplivingin um meira enn sjálva lesingina.

Tað er týdningarmikið at geva rúmd fyri ymsum sløgum av lesing, tí tey umboða eitt stórt lop í bæði tí at skilja tað, ein lesur, og kensluna av at megna lesingina.

Um vit skulu ala fram lesigleði hjá okkara næmingum, er fyrsta fyritreytin tileggjan. Nógv børn byrja í skúlanum við stórum ætlanum og vónum um at læra at lesa. Lesing er ein høgt virdur førleiki, og syrgt má vera fyri at geva øllum næmingum upplivingar av at duga og at eydnast í lesitilgongdini. Hetta kann gerast við at arbeiða út frá tí grundleggjandi tørvinum hjá einstaka næminginum.

Bæði lesing og skriving eru samskifti. Tann, sum skrivar, ber fram ein boðskap, og tann, sum lesur, tekur ímóti hesum boðskapi. Tann, sum lesur, má kunna lesa og avkoda einstøk orð, og hann ella hon má eisini skilja orðini, knýta eina meining til tey. Hesir báðir liðirnir lýsa, hvat lesing er, nevniliga avkoding faldað við tí at skilja - samanumtikið eitt úrslit av hesum báðum pørtum (Austad, 1999a).

## Ástøði um lesing

Fyri betur at skilja, hvat lesing er, eru gjørdir myndlar. Nevnast kunnu menningarmyndilin av lesiførleika hjá Snowling & Hulme, 1999 og tvívegis leiðin t.d hjá Høien & Lundberg, 1997. Í hesum seinna myndlinum verður serliga hugt at teimum ymisku partstilgongdunum, sum ganga inn í avkodingina av orðum. Hesar partstilgongdir vera hildnar at vera stig-skipaðar og treytaðar hvør av aðrari. Hildið verður eisini, at tað so við og við verður bygt upp ein goymsla av orðum í langtíðarminninum. Henda goymsla verður ofta rópt *leksikon*.

Í fyrra myndlinum verður serliga hugt at menningini av lesiførleika sum eitt beinleiðis úrslit av ávísum tali av sansingarávirkanum og møguleikum at læra. Her verður hildið, at lesarin kennir aftur orð, við at eitt kervi av nervakyknum verður gjørt virkið. Henda tilgongdin gongur skjótari, oftari ein sær eitt ávíst orð. Førleikin mennist, og næmingurin dugir betur og betur, meira hann lesur. Hetta er tað helst eingin, sum kann vera ósamdur um: *vit gerast betri lesarar, meira vit lesa.*

Sambært Tønnessen, 1999, er seinni myndilin góður at lýsa, hvussu lesiførleikin kann gerast sjálvvirkin – hvussu vit læra at avkoda orð á ein skjótan og gagnligan hátt - meðan tvívegis leiðin lýsir teir partsførleikar, sum tað er av stórum týdningi námsfrøðiliga at kenna til.

Tvívegis leiðin hjá Høien & Lundberg (1997) hevur víst seg at vera ein góður myndil at kortleggja, hvat næmingurin dugir, og hvat hann stríðist við, tá ið hann skal lesa orð. Aðalmálið í hesum myndlinum er ein goymsla av orðum í langtíðarminninum (leksikon). Her verður upparbeiddur og varðveittur kunnleiki um, hvussu orðið verður framborið. Hetta

verður rópt ortografiski, semantiski og fonologiski samleikin hjá orðunum. Hildið verður, at hesar ymisku síðurnar av einum og sama orði ávirka hvør aðra sínamillum.

- Fonologiski samleikin hjá orðinum: vísir til, hvussu orðið verður úttalað
- Ortografiski samleikin hjá orðinum: vísir til, hvussu orðið verður stavað
- Semantiski samleikin hjá orðinum: vísir til, hvat orðið merkir, ella hvat hugtakið goymir í sær

Orðagoymslan verður bygd upp so við og við, og tað eru tveir ymsir hættir at brúka hesa goymslu. Annar er fonologiski virkishátturin, og hin er ortografiski virkishátturin.

Hin tryggi lesarin ognar sær og brúkar báðar virkishættirnar á ein smidligan hátt. Tann fonologiski virkishátturin er mest tíðarkrevjandi og setur størst krøv til stutttíðarminnið. Tá ið talan er um ókend og sjáldsom orð, verður kunnleiki um einstakar bókstavir, stavilsir og morfem brúktur at gera ein "ljóðpakka" av bókstavaraðnum. Hetta merkir, at lesarin má gera skrifttekn um til ljóð. Sostatt má viðkomandi kunna hava ljóðini so leingi í stutttíðar-minninum, at tað ber til at gera eina fonologiska syntesu ella samandrátt. Grundarlagið er harvið lagt at finna fonologiska og semantiska samleikan – hvussu orðið ljóðar, og hvat tað merkir. Henda virkisháttin má ein duga at brúka, tá ið ein kemur fram á ókend ella sjáldsom orð, og orð sum eru samansett á ein serligan hátt.

Um ein brúkar tann fonologiska virkisháttin, má lesarin bæði hava fonologiskar førleikar og virkisført stutttíðarminni. Trupulleikar á hesum økjunum eru til hindurs fyri, at tann fonologiski virkishátturin mennist til ein virknan førleika. Um ein næmingur hevur ilt við at lesa sonevnd tvætliorð ella bókstavarøðir uttan meining í, kann hetta vera ein ábending um, at næmingurin ikki dugir fonologiska virkisháttin. Av tí at meiningin ikki kann verða tikin úr langtíðarminninum, má ein fonologisk umskipan gerast, sum so má gerast grundarlagið undir framburðinum av orðinum. (Skaathun, 1993).

Lesarin má hava tamarhald á bæði perceptuellum og kognitivum partsførleikum fyri at virkishættirnir skulu kunna lærast og brúkast. Hin tryggi lesarin skiftir ímillum báðar virkishættirnar eftir tørvi, t.v.s. alt eftir um orðini er kend ella ókend, sjáldsom, long ella samansett. Um ein næmingur hevur perceptuellar trupulleikar, rakar hetta bæði sløgini av virkishættum. Hetta er eisini galdandi, um næmingurin ikki kennir bókstavirnar.

Hin ortografiski virkishátturin er skjótari og krevur minni mentala orku. Lesarin brúkar henda háttin, tá ið eitt orð beinanvegin verður kent aftur, og hann samstundis veit, hvat orðið merkir, og hvussu orðið verður framborið. Her ræður um at vita, hvussu orðið verður rætt stavað (ortografiin). Tað semantiska sjónarhornið hevur eisini stóran týdning her; ein má vita, hvat orðið merkir, og hvussu tað ljóðar, og henda vitanin skal beinanvegin koma fram fyri lesaran.

Trygg nýtsla av ortografiskum virkishættum verður bygd upp ígjøgnum langa tíð, við at somu orðini verða avkodað aftur og aftur í ymsum teksti. Stutt sagt krevur hetta nógva lesing (Aaron & Joshi, 1992). Trupulleikin hjá veika lesaranum er sum oftast, at hann *ikki* lesur nógv. Fleiri veikir lesarar leggja seg í høvuðsheitum eftir antin tí fonologiska virkisháttinum ella einum ófullkomnum ortografiskum virkishátti. Tær neiligu fylgjurnar av einum tílíkum einstáttaðum vali av virkishættum er óneyv avkodan av orðum og tískil vantandi fatan.

## Hvussu mennast avkodingarvirkishættir?

Lesiførleikin mennist ígjøgnum mong ár. Hildið verður, at menningin fer ígjøgnum ymisk menningarstig, og hugt verður at støðinum í menningin, sum er treytað av samtekstinum á henda hátt:

- Pseudolesing (meining verður fingin til vega frá skeltum ella búmerkjum)
- Logografisk lesing (umhvarv av orðinum og kunnleikin um, hvussu einstaki bókstavurin sær út)
- Alfabetisk-fonemisk lesing (alfabetiska kodan er loyst)
- Ortografisk-morfemisk lesing (lesingin er sjálvvirkin)

Úr: Høien & Lundberg (1997).

Tað er týdningarmikið, at vit skriva okkum aftan fyri oyrað, at innan hvørt av hesum stigunum er menningin ein áhaldandi tilgongd, og at skiftið millum tey ymsu stigini er glíðandi. Tá tað er neyðugt, kunnu førleikar frá teimum ymsu stigunum brúkast í senn. Sum náturligt er, skunda nakrir næmingar sær skjótt ígjøgnum tey ymsu stigini, meðan aðrir brúka langa tíð á hvørjum menningarstigi.

Summir næmingar fáa trupulleikar í lesitilgongdini. Tað verður ov langdrigið í hesum umfari at koma inn á, júst hvat hesir næmingar hava at dragast við í lesimenningartilgongdini, ella hvar teir møguliga eru steðgaðir upp í lesimenningini.

Lærarar siga frá, at umleið 15 – 20 % av næmingunum hava okkurt slag av lesi- og skrivitrupulleikum (Gillberg, 1996). Hesin bólkurin er ikki einsháttaður. Á sama hátt sum aðrir næmingar hava eisini hesir næmingar sera ólíkar vitbornar fortreytir, royndargrundarlag, uppvakstrarlíkindi og sinnalag. Tað, hesir næmingar hava í felag, er, at teir í styttri ella longri tíðarskeið hava tørv á eyka vegleiðing og hjálp fyri at ogna sær gagnligar lesi- og skriviførleikar.

Orsøkin til hesar trupulleikar er hjá nøkrum næmingum ein neurobiologisk menningarórógv, dysleksi (Asbjørnsen, 2002). Nýggj gransking vísir, at henda órógv fevnir um umleið 2-5 % av næmingunum ella møguliga enn minni enn tað. Við øðrum orðum kunnu vit ikki javnseta dysleksi og vanligar lesi- og skrivitrupulleikar.

Tað er neyðugt at vera varug við, at ófullkomin lesi- og skriviførleiki í sjálvum sær kann hava sera neiligt árin á sjálvsmyndina hjá næminginum, sama hvørjar orsøkirnar til trupulleikarnar kunnu vera. Hetta kann eisini vísa seg í internaliseraðum ella eksternaliseraðum atburði. Internaliseraður atburður er eyðkendur av sosialum undanhaldi, angist, eyðkennum um tunglyndi og likamliga kvøl, meðan eksternaliseraður atburður er eyðkendur av, at næmingurin brýtur siðvenju og er ágangandi.

Tað er av alstórum týdningi, at vit hava fólk innan føroyska skúlaverkið, sum kunnu gera tað skiljandi fyri onnur, t.d. lærarar og foreldur, at næmingar kunnu hava sera ymiskar trupulleikar at dragast við, og at hesir trupulleikar kunnu vísa seg tíðliga ella seint í menningini. Trupulleikarnir kunnu sum sagt vera úr heilt smáum til sera umfatandi trupulleikar. Hjá summum næmingum eru hesir trupulleikar av fyribils slag, meðan aðrir næmingar mugu berjast við trupulleikarnar leingi, møguliga alt lívið.

Fyri at kunna arbeiða meira miðvíst við hesum, er týdningarmikið at hava nágreiniligan kunnleika, sum er tikin úr okkara egna jørðildi, sum grundarlag undir komandi tiltøkum á lesiøkinum. Til tess at fáa til vega empiriskt grundaða vitan um, hvussu stendur til við lesingini her hjá okkum, er farið undir eina kanning av lesiførleika hjá føroyskum børnum í

tveimum økjum í Føroyum. Farið er undir at kanna 1., 2. og 3. flokkarnar og hildið verður á í trý fylgjandi ár.

# Lesikanning

## Háttalag

Til at koma skjótt í gongd var valt at nýta kanningarhættir, sum eru til taks og hava verið nýttir eina tíð. Her er úrvalið ikki so stórt hjá okkum, men føroyskar útgávur av hesum lesikanningum eru til taks: OL-64 og OL-120. Vanliga hava hesar kanningar verið nýttar til einstakar næmingar, serliga í sambandi við at skúlin ikki hevur hildið, at lesitilgongdin hevur verið nøktandi. Tó hevur eitt nú NSR-tænastan í Eysturoy nýtt henda hátt at kanna allar 1., 2. og 3. flokkar í sínum øki í 2007 og hevur ætlanir um at gera slíkar kanningar árliga.

Vit valdu at nýta OL-64 til 2. flokk og OL-120 til 3. flokk. Hesar kanningar eru gjørdar við einum bólki í senn, við hvørt einum heilum flokki, um hann ikki var ov stórur – og við hvørt var flokkurin býttur sundur í tvey.

Tað vóru eftirløntir lærarar, sum gjørdu tað praktiska arbeiðið við at gera royndirnar við næmingunum. Kanningarnar fóru fram í august 2007.

1. flokkarnir vóru kannaðir við teirri sonevndu SPU-kanningini (SkoleParathedsUnder-søgelse). Henda kanningin er í einari danskari útgáva, men í hesi kanning er tað ikki lesingin, sum verður kannað – heldur fortreytirnir hjá barninum at fara undir at læra at lesa - eitt nú orðatilfeingi og hugtøk, so tað hevur ongan týdning fyri úrslitið, at útgávan er donsk.[1] Hvør næmingur var kannaður einsæris. Tað vóru royndir námsfrøðingar, sum vóru vanir við at gera SPU-kanningar, sum kannaðu børnini.

Kanningarnar fóru fram í tveimum økjum, sum vit her nevna øki I og øki II. Harumframt var tað lagt soleiðis til rættis – bæði við SPU-kanningunum og OL-kanningunum – at tað vóru kannarar úr øki I, sum kannaðu í øki II og øvugt.

Bæði lesiroyndirnar OL-64 og OL-120 og SPU-kanningarnar fóru fram uttan nakrar trupulleikar.

Í hesi grein verða bert úrslitini frá OL-kanningunum viðgjørd.

---

[1] Sjálvandi verður virkað fyri at fáa føroyskar útgávur í framtíðini.

Talið av næmingum, sum kannaðir vóru, er 585, sum býta seg sum víst í talvuni niðanfyri.

| | SPU 1.fl | OL-64 2.fl. | OL-120 3.fl. | tils. |
|---|---|---|---|---|
| I | 132 | 119 | 109 | *360* |
| II | 77 | 85 | 63 | *225* |
| *tils.* | *209* | *204* | *172* | *585* |

**Talva 1: Yvirlit yvir tal av kannaðum næmingum – býtt eftir øki og flokki**

## OL-64 og OL-120 kanningarnar

Hesar báðar nevndu kanningar, ið sum nevnt vóru framdar í 2. og 3. flokki fara fram á tann hátt, at eitt lítið hefti við ávikavist 64 og 120 orðum verður lagt fyri næmingarnar. Til hvørt orðið eru 4 myndir. Næmingurin skal nú velja ta myndina, sum samsvarar við orðið. Tað vil siga, at bæði avkoding og fatan verða máld. Tíðin er eisini ein faktorur, við tað at OL-64 er avmarkað til 10 minuttir og OL-120 til 15 minuttir. Fremst í heftinum er ein venjingarsíða, so næmingurin dugir mannagongdina, áðrenn hann byrjar sjálva kanningina.

Eftir at kanningarnar vóru gjørdar, vórðu úrslitini løgd inn í rokniark eftir ásettum frymli[2]. Burtur úr hesum fæst ein bólking av næmingunum, sum er ein mynd av tí, tey avrikaðu júst henda dag. Ein og hvør kanning er jú ein mynd av tí, sum luttakararnir megnaðu júst hesa ferð. Til tess at bøta um hesa óvissu er tað, at heilir flokkar og lutvíst stórt tal av næmingum verða kannaðir.

Kanningarnar OL-64 og OL-120 nýta bólkingar í tveimum dimensiónum: A, B og C – og innan hvønn av hesum bólkum verða tey kannaðu aftur býtt sundur í 1, 2 og 3. Niðanfyri er eitt stutt yvirlit yvir hesa bólking:

A1: Næmingurin lesur tey flestu orðini trygt, beinleiðis og skjótt.

A2: - beinleiðis lesingin er ótrygg – umvegis lesing.

A3: - størri tal av umlopnum orðum, yvirvarin, torir illa at gita.

[2] Samsvarandi reglum hjá Dansk Psykologisk Forening

B1: Næmingurin lesur bæði beinleiðis og umvegis, tykist vilja gita, lesur hampuliga rætt og skjótt.

B2: - beinleiðis lesing er ótrygg, ófullfíggjaður arbeiðsháttur.

B3: - ótrygg lesing og ófullfíggjað, yvirvarin.

C1: Umvegis lesing. Trygg lesing, men gongur seint og langrøkið.

C2: - ótrygg lesing og gitir ofta skeivt.

C3: - hjálparleyst.

Í kanningum aðrastaðni - t.d. Nord-læs kanningini í Danmark (Nielsen 2007) verður ofta arbeitt við 3 bólkum í staðin fyri omanfyri nevndu 9 bólkum. Teir bólkarnir eru: *Tryggir og skjótir lesarar – Tryggir, men seinir lesarar – Ótryggir lesarar.*

A1 og B1: Tryggir og skjótir lesarar. Lesistøðið er høgt.

C1: Tryggir, men seinir lesarar.

Ótryggir lesarar: krevja nógvan stuðul í lesimenningini.

## Úrslit

Heildarúrslitið av OL-64 kanningini í øki I og øki II er víst í talvu 2.

| *Øki* | *A1* | *A2* | *A3* | *B1* | *B2* | *B3* | *C1* | *C2* | *C3* | *tils.* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| *I* | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 38,7 | 2,5 | 5,0 | 18,5 | 6,7 | 28,6 | 100,0 |
| *II* | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 27,1 | 1,2 | 0,0 | 32,9 | 14,1 | 24,7 | 100,0 |

**Talva 2: Úrslitið av OL-64 í % býtt eftir bólki og øki**

Vit leggja til merkis, at eingin er bólkaður í A1, A2 og A3. Teir allarbestu lesararnar, sum áttu at verið í bólki A1, hava vit ikki. Harumframt síggja vit ein ávísan mun millum økini, soleiðis at B1 í øki I fevnir um 38,7%, og í øki II eru 27,1% í bólki B1.

Heildarúrslitið av OL-120 í øki I og øki II er víst í talvu 3.

| Øki | *A1* | *A2* | *A3* | *B1* | *B2* | *B3* | *C1* | *C2* | *C3* | *tils.* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| I | 5,5 | 0,0 | 0,0 | 44,0 | 2,8 | 2,8 | 24,8 | 8,3 | 11,9 | 100 |
| II | 7,9 | 0,0 | 0,0 | 39,7 | 3,2 | 4,8 | 28,6 | 6,3 | 9,5 | 100 |

**Talva 3: Úrslitið av OL-120 í % - býtt eftir bólki og øki**

Í byrjanini av 3. flokki, sum tað her er talan um, fáa vit nakrar næmingar í A1-bólkin: Ávikavist 5,5% í øki I og 7,9 í øki II. Øki I hevur heldur fleiri næmingar í B1-bólkinum – 44,0% móti 39,7% í øki II.

Fyrivarni verður tikið fyri úrslitunum; í hesum umfari verður staðfest, at úrslitini eru, sum vit síggja tey her. Fleiri útgreiningar verða gjørdar seinni.

## Ein møgulig frágreiðing

Venda vit aftur til bólkingina:

A1 og B1: *Tryggir og skjótir lesarar*

C1: *Tryggir, men seinir lesarar*

Hini: *Ótryggir lesarar*

so sær myndin fyri 2. flokk – OL-64 – soleiðis út:

| Øki | *Tryggir og skjótir lesarar* | *Tryggir, men seinir lesarar* | *Ótryggir lesarar* | *tils.* |
|---|---|---|---|---|
| I | 38,7 | 18,5 | 42,8 | *100* |
| II | 27,1 | 32,9 | 40,0 | *100* |

**Talva 4: OL-64 - bólking í høvuðsbólkar í %**

Munurin millum bæði økini er serliga lesiferðin, sum er munandi betri fyri øki I. Aftrat tí er bólkurin ótryggir lesarar heldur stórur í báðum økjum.

Fyri 3. flokk - OL-120 – sær myndin soleiðis út:

| Øki | *Tryggir og skjótir lesarar* | *Tryggir, men seinir lesarar* | *Ótryggir lesarar* | *tils.* |
|---|---|---|---|---|
| I | 49,5 | 24,8 | 25,8 | *100* |
| II | 47,6 | 28,6 | 23,8 | *100* |

**Talva 5: OL-120 - bólking í høvuðsbólkar í %**

Eisini fyri 3. flokk eru fleiri tryggir og skjótir lesarar í øki I, men munurin lítil – bert 1,9%. Og bólkurin ótryggir lesarar er 2% størri í øki I enn í øki II.

Hvussu hesi úrslit skulu tulkast er ivasamt. Tað sæst betur, tá kanningarnar verða endurtiknar komandi árini.

## Ein lítil samanburður

Við stórum fyrivarni kunnu vit sammeta við samsvarandi tøl úr Danmark. Sjálvsagt er føroyskt mál ikki tað sama sum danskt mál, men vit kunnu leggja til merkis, at danskt verður roknað sum eitt torført mál, tá talan er um at læra at lesa (Seymour, 2005).

Í ritinum *Projekt Danlæs 1999 – 2000* (Nielsen, 2007) finna vit hesi miðaltøl fyri 1999:

| | *Tryggir og skjótir lesarar* | *Tryggir, men seinir lesarar* | *Ótryggir lesarar* | *tils.* |
|---|---|---|---|---|
| *OL-64* | 53 | 23 | 24 | 100 |
| *OL-120* | 55 | 19 | 26 | 100 |

**Talva 6: Landsúrslit fyri Danmark 1999 - í %**

Vart verður gjørt við, at kanningarnar í Føroyum eru gjørdar í august í ávikavist 2. og 3. flokki. Í Danmark eru samsvarandi kanningar gjørdar í mai í ávikavist 1. og 2. flokki. Tey føroysku børnini eru sostatt 3 mánaðir eldri.

Vit síggja, at munurin er størstur fyri OL-64, har ávikavist 38,7% og 27,1% av føroysku børnunum verða bólkað sum *tryggir og skjótir lesarar* – og 53% av donsku børnunum.

*Tryggir, men seinir lesarar* eru ávikavist 18,5% og 32,9% av teimum føroysku børnunum – og 23% av teimum donsku. *Ótryggir lesarar* eru ávikavist 42,8% og 40% av føroysku børnunum – og 24% av teimum donsku.

Viðvíkjandi OL-120 er støðan tann, at ávikavist 49,5% og 47,5% av føroysku børnunum eru bólkaðir sum *tryggir og skjótir lesarar* – og 55% av teimum donsku. Ávikavist 24,8% og 28,6% av føroysku børnunum eru bólkað sum *tryggir, men seinir lesarar* – og 19% av teimum donsku. Sum *ótryggir lesarar* eru ávikavist 25,8% og 23,8% av teimum føroysku børnunum bólkað – og 26% av teimum donsku. Her sýnast úrslitini at liggja ájavnt fyri Føroyar og Danmark.

Ein fyribils niðurstøða tykist vera, at serliga er tað lesiferðin, sum ger munin. Henda fyribils niðurstøða skal sjálvandi takast við fyrivarni, men kann vera ein ábending um, at virkað eigur at verða fyri at fáa føroysk børn skjótari í gongd at lesa.

## Niðurløga

Í hesi greinini ber ikki til at gera ov viðfevndar niðurstøður, tí tilfarið er avmarkað. Vit eru nú í gongd við neyvari greiningar av kanningarúrslitunum, og tær greiningarnar saman við komandi kanningum fara at geva betri grundarlag at gera niðurstøður burturúr.

# Bókmentir

Aaron, P. & Joshi, R. (1992). *Reading problems: Consultation and remediation*. New York: Gilford Press.

Asbjørnsen, A. (2002). Dysleksi. Teoretiske og kliniske aspekter. Í: Gjærum, B. & Ellertsen, B. (ritstj.) *Hjerne og adferd, 2. utgave* (476-514). Oslo: Gyldendal Akademisk.

Austad, I. (1999a). Lesing og lesevansker. *Norsklæreren,* nr. 4, 5-10.

Gillberg, C. (1996). *Ett barn i varje klass – om DAMP, MBD och ADHD*. Stockholm: Cura AB.

Høien, I. & Lundberg, I. (1997). *Dysleksi. Fra teori til praksis.* Oslo: Ad Notam Gyldendal AS.

Nielsen, J. C. (2007). *Projekt Danlæs 1999 – 2000, Undersøgelse og pædagogisk evaluering af danske børns læsning,* Dialogoplæg, Danmarks Pædagogiske Universitetsskole, Aarhus Universitet.

Seymour, P. H. K. (2005). Early Reading Development in European Orthographies. Í: Snowling, M. J. & Hulme, C. (ritstj.), *The Science of Reading. A Handbook* (295-315). Malden: Blackwell Publishing.

Skaathun, A. (1993). *Den normale leseprosessen*. Stavanger: Senter for Leseforskning.

Tønnessen, F.E. (1999). Options and limitations of the cognitive psychological approach to the treatment of dyslexia. *Journal of learning disabilities, 32,(5),* 386-393.